Jóhan Eli Poulsen
løgtingsmaður

Nr. 38/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um arbeiðsháttin hjá Kringvarpi Føroya og møguligar avleiðingar, settur landsstýrismanninum í mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52a)

1. Fer landsstýrismaðurin at áleggja kringvarpsstjóranum at kanna, hvør hevur likið út upptøkuna um "Huawei-málið"?
2. Hvørjar avleiðingar fær tann hátturin, sum upptøkan er gjørd uppá, fyri KvF?
3. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at KvF ikki frameftir miðlar upplýsingar, sum kunnu seta landsins virði og trúvirði í vanda?

Viðmerkingar:
Nú um dagarnar hevur nógv fokus verið rundan um sokallaða "Huawei-málið", har KvF hevur víst á eina upptøku, sum teir av órøttum hava gjørt, og síðani fingið fútabann fyri at miðla. Bert KvF hevði hesa upptøku. Av ókendum grundum er hon endurgivin í danska blaðnum BT um dagarnar, hóast fútabann er sett fyri at brúka hana.

At almenna kringvarpið soleiðis avlurtar trúnaðar samrøður og almannakunnger tær er landi og fólki til bága, tí tað kann seta landið í ringt ljós og seta stór virðir í váða. Spurningurin, ið stingur seg upp, er eisini, um fólk kunnu hava álit á KvF, tá ið tey arbeiða á slíkan hátt. Kringvarpsstjórin hevur sagt alment, at KvF ikki hevur útflýggjað upptøkurnar. Tað kann ljóða løgið, tí bert KvF hevði upptøkuna.

Á Løgtingi, 16. desember 2019

Jóhan Eli Poulsen